# Faroe Petroleum ætl á landgrunninum

**OLJUBRUNNUR** Útlit eru til, at enn ein brunnur verður boraður á føroyska landgrunninum í ár ella næsta ár. Fyristøðufelagið er Faroe Petroleum.



*Her vitja Graham Stewart og Nils Sørensen, stjórar í Faroe Petroleum í Tinganesi undan Anne Marie boringingi í fjør. Løgmaður og oljumálaráðharrin taka ímóti*

*Mynd Jan Müller*




*Rannváloyvið – 012 - liggur heilt har suðuri á landgrunninum*

**Jan Müller**

Føroyska oljufelagið Faroe Petroleum hevur í kvittanum at bora ein brunn har suðuri á landgrunninum seinni í ár ella í næsta ár. Hetta sigur Graham Stewart, stjóri í felagnum. Felagið eigur loyvið 012, eisini nevnt Rannvá, har suðuri móti markinum og hevur nú í eina tíð roynt at lodda dýpið hjá ymsum altjóða oljufeløgum fyri at fáa tey at vera við til at bora ein brunn.

Samráðingar hava verið við fleiri feløg hesi seinastu árini. Tað nýggjasta felagið, sum Faroe Petroleum hevur samband við, er Cairn Energy, sum fer at bora fýra brunnar í Grønlandi í ár. Um Faroe Petroleum fær eitt felag sum Cairn at átaka sær ein part av útreiðslunum til at bora ein brunn, so metir Graham Stewart, at teir fara at bora antin í ár ella í 2012. Loyvið talan er um liggur á tí kenda Wyville Thomsen rygginum, har kanningar hava víst, at tað finnast sera stórir struktarar í undirgrundini, sum kunnu goyma olju og gass. Herfyri gjørdi Faroe Petroleum botnkanningar á staðnum fyri at vita, hvussu tjúkt basaltið er. Hetta verður gjørt fyri at finna tað rætta staðið at seta borin í.

Graham Stewart viðgongur, at váðin at bora ein brunn á Rannvuleiðini er stórur, men afturfyri er eisini møguleiki at fáa nógv burtur úr, um eitt fund verður gjørt. Metingar siga, at strukturin í undirgrundini á Rannvá leiðini er ein tann størsti ikki boraði strukturin í Norðureuropa.

Um so er at Faroe Petroleum hevur eydnuna við sær at fáa onnur oljufeløg at taka part á váðanum at bora ein brunn á landgrunninum, so merkir hetta, at tað verða boraðir tríggir brunnar her komandi tvey árini. Statoil hevur bundið seg til at bora tveir brunnar.

## Ikki slept Grønlandi

Tað er eingin loyna, at tað kom dátt við hjá Faroe Petroleum ikki at fáa leitiloyvi í Grønlandi. Felagið hevði gjørt eitt rættiliga stórt tøkniligt arbeiði fyri at vera við í leitingini har. Felagið gjørdi sum tað fyrsta oljufelagið í Grønlandi eisini eina roynd at stovna lokalt felag, har eisini grønlendingar kundu seta pengar í. Felagið metir tað hava stóran týdning at arbeiða lokalt. Eisini royndi felagið at stuðla grønlendingum við sínum royndum frá útgerðarhavnini í Runavík, sum felagið hevur verið ein av høvuðsstigtakarunum til. Sum skilst hevur Faroe Petroleum brúkt rættiliga fitt av pengum fyri at vera við í grønlendska oljuævintýrinum. Tøl sum 25 mill. kr. verða nevnd. Ein høvuðsorsøk til, at tað ikki eydnaðist